ítróttur

Nr. 37 • týsdagur • 21. februar 2006 • 80. árgangur • www.sosialurin.fo

# Føroyar vilja ikki í part við Grønland



*Heðin Mortensen heldur, at føroyska umsóknin um limaskap í IOC frá 1984 kann verða einasti vegurin upp í Olympisku leikirnar*

**– Svarið, sum Brian Mikkelsen hevur fingið frá altjóða Olympisku nevndini, umfatar bert Grønland. Vit hava frábiðið okkum, at møguligur føroyskur limaskapur skal tengjast at hesum, sigur Heðin Mortensen, ÍSF-forseti. Og serligar orsøkir eru til tað**

OLYMPISKUR LIMASKAPUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Danski mentamálaráðharrin, Brian Mikkelsen, var í gjár á fundi við Jacque Rogge, formann í altjóða Olympisku nevndini. Ørindini hjá Brian Mikkelsen vóru at kanna eftir, hvørt IOC á nakran hátt kundi loyva Grønlandi og Føroyum olympiskan limaskap. Hetta eftir stóru grønlendsku ónøgdina, nú grønlendskur skiðrennari ikki slapp við á danska OL-liði, hóast hesin leyk kravtíðirnar hjá IOC.

### Broytti einki

Hvørt danski mentamálaráðharrin hevði nakra veruliga vón um, at vitjan hansara skuldi geva úrslit. Ella um talan bert var um eitt politiskt stunt fyri at linka grønlendsku ónøgdina, skulu vit lata vera ósagt. Men í øllum førum var svarið, sum hann fekk frá IOC púrasta greitt.

– Jacque Rogge stóð fast við síni sjónarmið. Møguleikarnir fyri grønlendskum og føroyskum limaskapi eru sera, sera lítlir. Tað stendur beinleiðis í viðtøkunum, at einans lond, sum eru góðtikin av ST sum sjálvstøðug lond, kunnu gerast IOC-limir. Eg fái ikki broyt reglarnar hjá IOC, men eg kann vísa tað, sum eg haldi kann gagna ítróttini, segði Brian Mikkelsen.

### Greiðar IOC-lógir

Hesi orð eru tó ikki nakað, sum kemur óvart á Heðin Mortensen, formann í ÍSF, sum varðar at føroysku royndunum at fáa IOC-limaskap.

– Hasum vistu vit av. Lógirnar hjá IOC eru púrasta greiðar, og teimum verður ikki víkt frá. Vit sendu eisini Brian Mikkelsen eitt brævi, áðrenn fundin, har vit frábóðu okkum at verða tengdir at málinum. Vit hava okkara egnu umsókn inni, og hon byggir á nakrar heilt aðrar fortreytir, vísir Heðin Mortensen á.

Tær serligu fortreytirnar, sum ÍSF-forsetin sipar til, at tann sannroynd, at føroyska umsóknin varð send inn longu í 1984. IOC-lógirnar um, at talan skal verða um sjálvstøðug lond, vórðu broyttar í 1996, og tí metir ÍSF, at føroyska umsóknin skal viðgerast á øðrum fortreytum. Saman við Føroyum er Gibraltar einasta hjálandið, sum hevur líknandi umsókn inni. Gibraltar hevur nú stevnt IOC, tí teir bara hava »súltað« umsóknini av politiskum ávum, heldur enn at geva góðkenningina, sum teir meta seg eiga.

### Skal ikki brúkast politiskt

– Fyri okkum er sakarmálið hjá Gibraltar sjálvandi rættiliga avgerandi. Fáa teir limaskap, so verður talan helst eisini um játtandi svar til Føroyar. Og tað er eisini orsøkin til, at vit so krampaktiga hava hildið fast um, at okkara umsókn er frá 1984, sigur Heðin Mortensen.

– Men mest av øllum, so er tað so sera umráðandi, at kortini hjá okkum nú verða spæld rætt. Vit skulu um ikki so langa tíð á fund við Rogget, sum vit hittu á fundi hjá Europeisku Olympisku nevndini herfyri. Og til tann fundin haldi eg, at vit eiga at mobilisera so væl, sum vit á nakran hátt kunnu. Tað vil siga við at hava løgmann og mentamálaráðharra við, eins og tað vónandi ber til at fáa stuðul frá donsku IOC-umboðunum.

– Skal hetta eydnast, so er tvingandi neyðugt, at vit øll standa sum ein maður. Og ikki at ein politikkari her og ein embætismaður har føra síni sjónarmið fram. Í hesum haldi eg, at ÍSF saknar ein veruligan politiskan stuðul. Altso ein stuðul, har politiski myndugleikin fyrst kemur til okkara, heldur enn at sleingja um seg við meiningum. Hetta er ikki eitt mál, sum skal gruggast av politikki, men eitt mál, har politiski myndugleikin kann hjálpa til í gongdini,. Og tað er kanska tað mest týdningarmesta av øllum, staðfestir Heðin Mortensen.

## AB nýggjan spælara

Argja Bóltfelag hevur fingið enn ein spælara á liðið, sum hevur drúgvar royndir frá 1. deildarfótbólti. Jákup Martin Joensen, sum hevur verið ein av spælarunum hjá EB/Streymi, fer nú at spæla við AB, skrivar heimasíðan hjá felagnum.

Jákup Martin hevur spælt á besta liðnum hjá EB/Streymi síðani 1993, og harafturat spældi hann við B36 í 1998.

## Ongin sáttmáli til Odogu

Joseph Odogu, sum hevur royndarvant í EB/Streymi seinastu vikurnar, er farin av landinum aftur. EB/Streymur vildi ikki binda seg til eina avtalu við spælaran, tí hann var ikki nakar styrkur fyri hópin. 21 ára gamli nigeriski spælarin spældi tríggjar dystir við EB/Streymi, og hann gjørodi tvey mál, men hóast hetta var hann vigaður og funnin ov léttur, skrivar heimasíðan hjá EB/Streymi.

## Claus fekk eina løtu í tapi

Coventry tapti um vikuskiftið 3-1 ímóti Plymouth í næstbestu ensku deildini. Føroyski landsliðsspælarin Claus Bech Jørgensen var eykamaður til dystin, men tá ið Coventry var komið aftur um 3-0, royndi venjarin Micky Adams at venda dystinum og skifti tríggjar nýggjar spælarar inn. Teirra millum vóru Claus Bech Jørgensen og veteranurin Dennis Wise. Útskiftingin munaði nakað. Dennis Wise fekk gult kort aftaná 40 sekund og lítla løtu seinni skoraði hann til endaliga úrslitið 3-1.

## Ingi eyka á eykaliðnum

Ingi Højsted er ein av spælarunum, sum skal verða við í dystinum hjá eykaliðnum hjá Birmingham ímóti West Bromwich týskvøldið.

Venjarin Keith Bertschin hevur tikið fleiri av royndu spælarunum hjá Birmingham við til dystin. Til dømis Nico Vaesen, Jamie Clapham og nýggja spælaran DJ Campbell.

Ingi Højsted er eisini tikin út til dystin, men í fyrstu syftu verður hann noyddur at hyggja at, tí hann skal saman við fýra øðrum spælarum verða eyka.